## Laksavirki stóra bót

Laksavirkið KB Finest í Esbjerg hevur fingið 662.000 krónur í bót fyri at brúka eitt ólógligt ískoytisevni í sínari framleiðslu. Tað serliga ferðaliðið hjá danska matvørueftirlitinum hevur avdúkað, at í hálvt triðja ár hevur virkið í Esbjerg brúkt 142 tons av nitrisalti í sínari laksaframleiðslu, hóast evnið ikki má brúkast, tí tað er krabbameinselvandi. Nikolaj Beir, sum er stjóri í KB Finest, sigur við danska kringvarpið, at leiðslan átekur sær fulla ábyrgd av tí, sum er hent, og at virkið er givið at brúka nitrit í framleiðsluni.



## Hóttir við uppsagnum

Fólk í New York eru á gosi, tí at borgarstjórin, Michael R. Bloomberg, hevur hótt við at geva 8.500 lærarum, 1.000 sløkkiliðsmonnum, 3.150 løgreglumonnum og øðrum starvsfólkum hjá kommununi sekkin. Harumframt hóttir hann við at lata fleiri ellisheim aftur. Orsøkin til hóttanina frá borgarstjóranum er, at staturin New York ætlar at skerja sína játtan til býin New York City, og tað hevur fingið øði í borgarstjóran. Hann sigur við tíðindastovurnar, at uttan býin New York var staturin New York ein fátækrabýlingur í USA.

*Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharri, er væl nøgdur við nýggju fiskiveiðiavtaluna við russar*



# Betri javnvág í avtaluna

**Eini hjún standa í Føroya Rætti í dag ákærd fyri heili 11 lógarbrot hvør sær og saman, sum fevna frá broti á ferðslulógina til skjalafalsan**

FISKIVEIÐI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í gjár seinnapart eydnaðist at fáa nýggja fiskiveiðiavtalu upp á pláss við russar.

Samráðingarnar endaðu annars úrslitaleysar í november, tá ein russisk sendinevnd var í Føroyum og tingaðist. Tað var um tað mundi, tá Skálaberg júst varð tikin, og hetta ávirkaði eisini samráðingarnar nakað.

Hesaferð vórðu samráðingarnar hildnar í Keypmannahavn, og tær gingu sum skilst væl.

- Vit løgdu okkum eftir at fáa betri javnvág í avtaluna hesaferð. Russar hava fingið í so nógv í sín part, men til tað skal tó sigast, at vit hava latið av okkara yvirflóð av svartkjafti, sigur Jacob Vestergaard.

Høvuðstølini fyri avtaluna 2009 vóru, at vit lótu russum 100.000 tons av svartkjafti og 12.800 tons av makreli, meðan vit fingu 11.900 tons av toski og 1.540 tons av hýsu.

Tølini fyri 2010 eru, at vit lata 85.500 tons av svartkjafti og 14.000 tons av makreli, meðan vit fáa 12.000 tons av toski og 1.540 tons av hýsu.

Umframt hetta eru so nakrir snøklar við um hjáveiðu, men soleiðis síggja tølini í høvuðsheitinum út, sigur Jacob Vestergaard.

### Væl nøgdur

Eitt annað, sum føroyska samráðingarnevndin við Andrass Kristiansen á odda, legði stóran dent á, var at samsvar er millum russisku og ensku orðingina.

- Ein trupulleiki í Skálaberg-málinum var, at russar tulkaðu russisku orðingina á ein hátt, meðan vit tulkaðu ensku orðingina á ein annan hátt. Hesaferð hava vit syrgt fyri, at fult samsvar er millum orðingarnar, sigur Jacob Vestergaard.

Hann sigur, at samráðingarnar í Keypmanahavn hava gingið væl, og tær vórðu sum nevnt lidnar seinnapartin í gjár.

- Eg eri væl nøgdur við avtaluna, sum nú er fingin í lag. Tað hevur eydnast okkum at hála nakað inn aftur av tí skeivleika, ið komin var í javnvágina í sáttmálanum, og tað er ein fín gongd, sigur Jacob Vestergaard.

Umframt samráðingarleiðaran, Andrass Kristiansen, vóru eisini Jeannette Nørgaard og Ulla Svarrer Vang frá Fiskivinnustovuni í Fiskimálaráðnum við eins og umboð frá Fiskiveiðieftirlitinum og frá føroyska og danska uttanríkisráðnum.

Sendinevndin kemur aftur í dag.

# Undir ákæru fyri skjalafalsan

**Eitt hjúnarpar stendur í Føroya Rætti í dag ákært fyri heili 11 lógarbrot hvør sær og saman, sum fevna frá fderðslubroti til skjalafalsan**

RÆTTARMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein føroyingur, sum av einihvørjari orsøk hevur fingið sær muslimskt navn, og tunesiska kona hansara standa í dag ákærd fyri heili 11 lógarbrot saman og hvør sær.

Nøkur av málunum snúgva seg um falskar upplýsingar til myndugleikarnar



*Eitt av málunum snúði seg um ein Mitshubishi vøruvogn, sum ákæruvaldið sigur, er nýttur sum persónbilur*

í sambandi við eitt arbeiðsloyvi til systir konuna, nøkur snúgva seg um skráseting av einum bili sum vøruvogn, har baksetrini vórðu sett í, skilaveggurin handan frontsetrini var tikin niður og vektmerkið tikið burtur. Alt krøv fyri at bilurin kann vera skrásettur sum vøruvognur.

Maðurin er eisini ákærdur fyri við følskum navni í tveimum førum at hava keypt teldu og annað fyri góðar 18.000 krónur og telduútgerð fyri 7.000 krónur, har rokningin skuldi sendast til uppfunnan mann á uppfunnum bústaði.

Av teimum 11 málunum kundi maðurin bert í eina førinum játta seg sekan, nevniliga í at hava tosað í telefon, meðan hann koyrdi.

Øll sakin er rættiliga drúgv, og roknað verður við, at rættarmálið dregur langt út á seinnapartin.

### Samansvørjing

Í morgun hava forholdini um falsan í sambandi við arbeiðsloyvi verið fyri, eins og forholdið við vørubilinum.

Tá søkt verður um fremmanda arbeiðsmegi, bindir arbeiðsgevarin seg til at gjalda innfluttu arbeiðsmegini eina fasta upphædd um mánaðin. Í hesum førinum hevur systir til ákærdu konuna fingið arbeiðsloyvi eftir treytum sum søgdu 10.000 krónur í bruttoløn um mánaðin umframt frían bústað og mat.

Hendan systurin gjørdist tó sjúk mest sum beinanvegin hon kom til Føroya úr Tunis, og hevði tí bert fingið 26.000 krónur í løn eitt heilt ár.

Ákærdu maðurin og konan søgdu seg einki kenna til, at hesar vóru treytirnar, og at systurin hevði fingið løn fyri ta tíðina, hon hevði verið til arbeiðis.

Í førinum við vørubilinum segði ákærdi maðurin seg vera útsettan fyri einari samansvørjing. Hann hevði sett bilin til sølu og onkur áhugaður bað um at síggja hann við baksetrinum í. Hann hevði tí sett hesi leys inn í bilin. Skilaveggin helt hann hava lítlan týdning, og vektmerkini vóru tikin av í sambandi við, at bilurin var umlakkeraður.

Ákærin, Hanna Vang, hevði kallað mann inn frá Akstovuni, sum eftir áheitan frá løgregluni hevði sýnað umrødda bil og kundi staðfesta, at vektmerkið manglaði, skilaveggurin var burtur og at baksetrini vóru ísett og fastbóltað.

Málið heldur sum nevnt fram út á seinnapartin.